# Millum Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið øðrumegin og Maskinmeistarafelagið hinumegin er hendan semja gjørd

í sáttmálunum millum:

Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar í almennari tænastu á landi,

Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið viðvíkjandi maskinmeistarum/motorpassarum á Strandferðsluni,

Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar/motorpassarar á fiskirannsóknarskipinum "Magnus Heinason",

Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar/motorpassarar á vaktarskipunum,

KAF og MF galdandi fyri maskinmeistarar í tænastu hjá SEV.

**§ 1**

**Lønir:**

Lønin í øllum sáttmálunum hækkar soleiðis:

Frá 1. oktober 2011 hækkar lønin 0,85 % fyri tey, sum forvinna kr. 20.000 um mánaðin ella minni. Fyri lønir hægri enn kr. 50.000 um mánaðin er ongin broyting. Broytingin millum 0,85 % og 0 % verður liniér sambært lønartalvum, sum partarnir góðtaka.

Frá 1. oktober 2012 hækkar lønin 0,85 % fyri tey sum forvinna kr. 20.000/mánaðin, ella minni. Fyri lønir hægri enn kr. 50.000 er ongin broyting. Broytingin millum 0,85 % og 0 % verður liniér sambært lønartalvur, sum partarnir góðtaka.

Hetta er tó ikki galdandi fyri tænastumenninar, sum fáa somu løn sum tænastumenn landsins.

§ 2

Í sáttmálanum millum:

**Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar í almennari tænastu á landi**

verða hesar broytingar gjørdar:

Í § 1, stk. 3 verður skoytt uppí:

Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólki úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið til ummælis við minst 14 daga freist. Felagið fær ikki ætlanarskrivið, men fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum.

Í § 20, stk. 9. verður fyrsti setningurin orðaður soleiðis:

Um maskinmeistari verður valdur í nevnd felagsins,......

§ 26 verður orðað soleiðis:

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2011 og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða skrivligari uppsøgn at fara úr gildi í fyrsta lagi tann 1. oktober 2013.

Í sáttmálanum millum:

**Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið viðvíkjandi maskinmeistarum/motorpassarum á Strandferðsluni,**

verða hesar broytingar gjørdar:

Í § 1, stk. 3 verður skoytt uppí:

Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólki úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið til ummælis við minst 14 daga freist. Felagið fær ikki ætlanarskrivið, men fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum.

§ 27 verður orðað soleiðis:

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2011 og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða skrivligari uppsøgn at fara úr gildi í fyrsta lagi tann 1. oktober 2013.

Í sáttmálanum millum:

**Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar/motorpassarar á fiskirannsóknarskipinum "Magnus Heinason",**

verða hesar broytingar gjørdar:

Í § 1, stk. 4 verður skoytt uppí:

Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólki úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið til ummælis við minst 14 daga freist. Felagið fær ikki ætlanarskrivið, men fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum.

§ 24 verður orðað soleiðis:
Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2011 og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða skrivligari uppsøgn at fara úr gildi í fyrsta lagi tann 1. oktober 2013.

Í sáttmálanum millum:

**Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar/motorpassarar á vaktarskipunum,**

verða hesar broytingar gjørdar:

§ 22 verður orðað soleiðis:
Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2011 og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða skrivligari uppsøgn at fara úr gildi í fyrsta lagi tann 1. oktober 2013.

Í sáttmálanum millum:

**KAF og MF galdandi fyri maskinmeistarar í tænastu hjá SEV.**

verða hesar broytingar gjørdar:

§ 2, stk. 3 verður orðað soleiðis:
Persónar, ið hava maskinistprógv ella føroyska maskinmeistaraprógvið, verða løntir í 6. lønarflokki.
Persónar við 2-ára maskinmeistaraútbúgving verða løntir í 9. lønarflokki.
Persónar við víðkaðari/3-ára maskinmeistaraútbúgving verða løntir í 10. lønarflokki.
Vaktmeistarar (1. maður á vakt á Fossaverkinum, Sundsverkinum og Vágsverkinum) verða løntir í 12. lønarflokki. Treytin fyri at vera í 12. lønarflokki ella hægri er víðkað/3-ára maskinmeistaraútbúgving.
1. meistarin í Suðuroy og á Sundi verða løntir í 15. lønarflokki.
Verkmeistari í Norðoyggjum verður løntur í 16. lønarflokki.
Verkmeistari í Suðuroy og í Vestmanna verður løntur í 17. lønarflokki.
Verkmeistari á Sundi og leiðandi medarbeiðarin á Framleiðsludeildini verða løntir í 18. lønarflokki.

§ 22 verður orðað soleiðis:
Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1.oktober 2011 og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða skrivligari uppsøgn at fara úr gildi í fyrsta lagi tann 1. oktober 2013.

Tórshavn, tann 7. januar 2012.

Maskinmeistarafelagið

Fíggjarmálaráðið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið